## Nýggj bók um happing




Salmiakk og spøki er heitið á nýggjari bók til tey 10-12 ára gomlu, sum Bókadeildin júst hevur givið út. Salmiakk býr úti á bygd í Norðnesi og verður altíð happaður, kanska serliga tí at hann er komin úr býnum út á bygd at búgva. Tað ringasta er, at hann ongan vin eigur at spæla við. Ein dagin flytur Spøki inn í kamarið hjá Salmiakk, og síðan verður alt broytt, tí hann gevur Salmiakk dirvi at standa ímóti ágangi. Mono Nilsson-Brännström, ið skrivað hevur bókina, sigur her frá um happing, tunglyndi, skilnað, men eisini um góðsku og tryggleika. Hóast evnið er álvarsamt, so er bókin ikki syrgilig, men tvørturímóti er hon á tremur við skemti og klikkaðum hugskotum. Bergur Rasmussen hevur týtt úr svenskum.

## Bókarøðin heldur fram



Onnur bókin í røðini um eldin er komin út. Tað er Eldsins gáta eftir svian Henning Mankell. Fyrra, Eldsins loyndarmál, kom út í vár. Bøkurnar eru grundaðar á veruligar hendingar hjá gentuni Sofíu, sum býr í Mosambik. Í fyrru bókini stríddist hon at koma fyri seg aftur, eftir at hava stigið á eina minu og mist yngru systur sína. Í hesari er onnur systir, Rósa, komin aftur úr Suðurafrika, og hon er álvarsliga sjúk. Sofía roynir at skilja, hvat er áfatt, men hon skilir ikki reiðiliga, bara hetta, at eldurin roynir at siga frá einari stórari vanlukku. Jákup í Skemmuni hevur týtt úr svenskum og Bókadeildin gevur út.

# Ísland vann Bókmentavirðisløn Útnorðurráðsins

**Íslendska Kristín Helga Gunnarsdóttir fekk í gjár Bókmentavirðisløn Útnorðurráðsins fyri bókina *Spøkilsisspor*. Í uppskoti úr Føroyum var *Apollonia* eftir Edward Fuglø**

VIRÐISLØN

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Í gjár fekk vælumtókti íslendski rithøvundurin Kristín Helga Gunnardóttir handað Bókmentavirðisløn Útnorðurráðsins á 60.000 krónur fyri bókina *Spøkilsisspor*.

Bókin er týdd til bæði føroyskt, danskt og grønlendskt og verður at fáa í bókabúðunum í næstum.



*Varðaformaður Útnorðurráðsins, Karl V. Matthíasson, handaði íslendska rithøvundanum, Kirstín Helga Gunnarsdóttir, Bókmentavirðisløn Útnorðurráðsins á hátíðarløtu í íslendska Altinginum í gjár*

### Bók til ung

Í grundgevingini fyri at lata íslendska rithøvundanum virðislønina fyri bókina *Spøkilsisspor* varð millum annað sagt:

- Við bókini hevur Kristín Helga Gunnarsdóttir gravað í gomlum sagnum og skapað eina fiktiva søgu um fornu støðini, sum ger lesararn forvitnan eftir at vita meir um tað, sum fer fram á hesum støðum.

Harttil vísti dómsnevnin á, at bókin eisini snýr seg um vanligar trupulleikar, sum ung ofta dragast við. Bókin nemur eitt nú við, hvussu torført tað kann vera at laga seg til tær relgur, sum foreldur og samfelagið seta, og hvussu tað ávirkar børnini og tey ungu, tá foreldrini fara frá hvørjumøðrum.

Kristín Helga Gunnarsdóttir hevur skrivað fleiri enn 10 barna- og ungdómsbøkur og er ein av mest lisnu rithøvundunum millum ung í Íslandi.

### Føroyar væl við

Hetta er fjóðru ferð, Bókmentavirðisløn Útnorðurráðsins verður latin. Virðislønin verður latin annaðhvørt ár, og føroyskir høvundar hava ikki smæðst burtur millum uppskotini, sum hava verið.

Í 2006 fekk Bárður Oskarsson virðislønina fyri bókina *Ein hundur, ein ketta og ein mús*.

Føroyska uppskotið hesuferð var bókin *Apollonia* eftir Edward Fuglø, meðan uppskotið úr Grønlandi var bókin *Abct* eftir Julie Edel Hardenberg.

Í dómsnevndini sita Oddfríður Marni Rasmussen, Føroyar, Vera Lise Rosing Olsen, Grønland og Silja Aðalsteinsdóttir, Ísland.

# Fyrsta yrkingasavnið eftir Hanus Kamban

**Eftir at hava virkað sum rithøvundur og týðari í mong ár, gevur Hanus Kamban nú út sítt fyrsta yrkingasavn**

NÝTT SAVN

Hanus Kamban hevur fyrr latið úr hondum stuttsøgusøvn, ævisøgulig verk, greina- og essaysøvn umfram týðingar eftir millum onnur Graham Greene, William Shakespeare og James Joyce. Men Café Europa er høvundsins fyrsta yrkingasavn, skrivar heimasíðan hjá Rithøvundafelagnum.




*Nýggja yrkingasavnið hjá Hanusi Kamban, Cafe Europa, verður lagt fram í Miðlahúsinum fríggjadagin*

### Europa sum hugtak

Heitið á savninum gevur eina ábending um, at ikki fáir av tekstunum peika á Europa sum søguligt, listarligt og fyrst og fremst skaldskaparligt og mentanarligt hugtak. Undir hesum neti av tilsipingum eru univers, sum lesarin sjálvur verður boðin at fara á rannsóknarferð í.

Bókin verður løgd fram á almennari móttøku í Miðlahúsinum fríggjadagin tann 12. september frá kl. 16.00 til 17.30. Andrea Heindriksdóttir spælir tvey verk á tvørfloytu, og høvundurin sigur nøkur orð um bókina og lesur nakrar yrkingar. Høvi verður til at ogna sær bókina fyri ein lagaligan prís og - um fólk ynskja - við høvundsins signaturi.

Forlagið bjóðar vín, djus, kaffi og - sum tað sømir seg á Café Europa - ein kakubita til tann kræsna góman. Øll eru vælkomin, sigur forlagið.

Tað er Mentanargrunnur Studentafelagsins, sum gevur út nýggja yrkingasavnið.

**-ave-**

# Nýggjar týðingar av heimsklassikarum

**Agnar Artúvertin hevur givið út tríggjar bøkur við egnum týðingum av eini røð av heimsklassikarum**

TÝÐINGAR

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Týðarin og rithøvundurin Agnar Artúvertin gevur nú út bøkurnar *Søgur úr Túsund og einari nátt*, Smettihjartað og aðrar søgur, týðingar eftir Edgar Allan Poe og Hálsketan og aðrar søgur, týðingar eftir Guy de Maupassant.

### Ævintýr og ræðusøgur

Í Søgur úr Túsund og einari nátt eru týðingar av 15 undurfullum, ótrúligum, erotiskum og eksotiskum ævintýrum.

Tey heimskendu ævintýrini úr Túsund og einari nátt eru á tremur við ótrúligum lýsingum, samrøðum, løgnum hendingum, fáblum og áminningum, sum kunnu gera lesaran stórliga bilsnan og hugtiknan, so at hann gloymir alt rundan um seg

Tær 12 týðingarnar eftir Edgar Allan Poe í bókini *Smettihjartað og aðar søgur* teljast millum tær allarkendastu eftir Poe - harímillum eru *Ligeia, The Fall of the House of Usher* og ein spildurnýggj týðing av *The Tell-Tale Heart*.

Stuttsøgurnar hjá Poe eru kendar um allan heim, og eiga tær enn í dag evnini at skaka og øta lesaran. Søga hansara *Smettihjartað* er til dømis ein ódeyðilig perla í heimsbókmentunum.

Millum tær 10 týðingarnar eftir Guy de Maupassant í *Hálsketan og aðrar søgur* eru til dømis *Le Horla, Pierrot* og *Deux Amis*. Maupassant verður sagdur at hava skrivað bestu stuttsøgurnar á fronskum yvirhøvur. Tær eru málsliga fullkomnar og speiskar. Tær flestu eru sera stuttar og snúgva seg um gerandishendingar, men eru tó sálarfrøðiliga gløggar og lata nógv vera ósagt.

Agnar Artúvertin, sum fyrr hevði eftirnavnið Jógvansson, gevur bøkurnar út á forlagnum Gwendalyn.

Agnar Artúvertin er Bachelor of Arts í bókmentum og heimspeki frá Cambridge og virkin stuttsøguhøvundur og týðari.

Nýggju bøkur hansara fáast í bókabúðunum ella við at venda sær til forlagið á forlagid.gwendalyn@gmail.com



*Hópin av heimskendum ævintýrum og ræðusøgum eru at finna millum nýggju týðingarnar hjá Agnari Artúvertin*